# Vaktætlan á fartelefonini

Vegleiðing



# Indhold

1 Vaktætlan ..... 3

Álmanakki ..... 3

Arbeiði ..... 4

Boð ..... 4

Ynskir ..... 5

Saldur ..... 5

Felagar ..... 6

Um meg ..... 6

# 1 Vaktætlan

Vaktætlan á fartelefonini vísir m.a. tína arbeiðsætlan, saldur, starvsfelagar og upplýsingar um teg. Eisini kunnu boð sendast millum starvsfelagar og leiðaran (umsitaran av Vaktætlan).
Niðanfyri eru valmøguleikarnir í Vaktætlan lýstir. Tann einstaka funktiónin niðanfyri verður eftirfylgjandi lýst í raðfylgjuni, sum brúkt verður á telefonini.

- Arbeiði
- Álmanakki
- Boð
- Ynskir
- Salda
- Felagar
- Um meg
- Hjálp
- Rita út




# Álmanakki

Tá ritað verður inn á Vaktætlan, kemur tú inn á álmanakkan, ið vísir tína arbeiðsætlan. Vaktætlan byrjar altíð at vísa verandi viku (‘Hendan vikan’), men møguleiki era at flyta upp ella niður á skerminum, um ynski er at síggja onnur tíðarskeið (aðrar vikur). Til ber eisini at síggja yvirlitið í mánaðum – sjá myndir niðanfyri.

**Vika**




**Mánaður**




Niðast á skerminum eru nakrar ikonur, ið kunnu brúkast til at ferðast millum ymiskar síður í skipanini. Tann bláa ikonin, vísir ta valdu síðuna.

Tá ið yvirlitið yvir arbeiðsætlanina sæst, er ‘Álmanakki’ niðast á skerminum markeraður við bláum. 

# Arbeiði

Um ein ávísur dagur verður valdur, sæst ein útgreining av degnum. Tá síggjast fleiri upplýsingar um vaktina, umframt at tað eisini ber til at samskifta við umsitaran/leiðaran um vaktina.

**Útgreining av degnum**




Tá ið útgreining av vaktini er vald, er 'Arbeiði' niðast á skerminum markerað við bláum. 


Um ein ynskir at koma aftur á yvirlitið yvir vaktir, skal 'Álmanakki' veljast. 


# Boð




í Vaktætlan er møguligt at samskifta á skrift við starvsfelagar ella umsitara/leiðara. Yvirlitið niðanfyri vísir møguleikarnar at senda boð.

**Yvirlit**




1) **Info**: Umsitarin í Vaktætlan kann senda kunning til fleiri persónar. Hesi boðini eru oftast felags boð og síggjast undir 'Info'. Hesi boðini kunnu ikki svarast.
2) **Dag**: Umsitarin og starvsfólk kunnu samskifta um eina ávísa vakt á einum ávísum degi. Hetta er eins og undir 'Arbeiði' – sí síðu 4.
3) **Felagi**: Starvsfelagar senda persónlig boð til ein ella fleiri útvaldar starvsfelagar.

# Ynskir

Ikki tøkt í løtuni.




# Saldur




Saldurnar í Vaktætlan verða vístar pr. mánað. Niðanfyri verða saldur vístar í Vaktætlan. Legg altíð til merkis, hvør tann valdi dagurin er.

**Balansu salda.** Balansan vísir tímarnar, tú hevur tilgóðar. Eisini sæst, hvussu nógvar tímar normurin er, teir skrásettur tímarnir og munurin millum norm og skrásettu tímarnar.

| Balance | |
|---|---|
| Timer | 102.00 timer |
| Norm | 110.00 timer |
| Diff. | -8.00 timer |
| Balance | 22.07 timer |

**Avspákinga salda.** Her sæst hvussu nógvir tímar eru til góðar á avspákingarsalduni.

| Afspadsering | |
|---|---|
| Ialt saldo | 56.55 timer |

**Feriu salda (lønt feria)**
Í yvirlitinum av feriutímunum sæst hvat er brúkt, ætlað og hvat er eftir at brúka (ej planlagt)

| Ferie m.løn | |
|---|---|
| Brugt m.løn | 0.00 timer |
| Planlagt | 94.00 timer |
| Ej planlagt | 46.00 timer |

**OK.fri – serstaka frívikan**. Yvirlitið er á sama hátt sum feriusaldan

| Ok.fri | |
|---|---|
| Brugt ovk.fri | 0.00 timer |
| Planlagt | 0.00 timer |
| Ej planlagt | 27.80 timer |

# Felagar




Í Vaktætlan eru øll starvsfólk skrásett í starvsfólkabólkum. Undir “Felagar” sæst í hvørjum bólki ein sjálv/ur er skrásettur, saman við hvørjum og hvør hevur vaktir á tí valda degnum. Møguligt er at síggja um starvsfelagar hava vakt ella eru fráverandi. Felagar sum avspáka, eru í feriu ella á annan hátt eru fráverandi, hava bláa markering við tekstinum “Fraværende”.

Møguligt er at vísa pr. dag ella viku.







# Um meg




Undir *”Um meg”* sæst, hvat er skrásett um teg í Vaktætlan. Harumframt er eisini møguligt at broyta loyniorðið og at broyta til annað mál.




